# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

## Vegleiðing til Heimablídni

Tórshavn, hin 4. februar 2010
Málnr.: 403-200900652-2
Útgáva 2


**Heimablídni** er virksemi, sum ikki skal góðkennast, og er ikki undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

**Endamálið** er at virka og borðreiða mat í privata húsarhaldinum fyri ferðafólki.

**Matvørulógin**[1], hóast Heimablídni ikki er undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, er treytir galdandi á økinum.

Serliga skal verða gjørt vart við, at:

- matvørurnar, sum borðreitt verður við, eru tryggar og góðar (sí § 11 í matvørulógini).

Víst verður eisini til Rakstrarreglurnar[2], har m.a. stendur, hvussu matur á rættan hátt verður:

- goymdur
- fluttur
- hitaviðgjørdur og
- køldur niður

**Maturin** skal verða virkaður í privata køkinum, og etin í privata køkinum ella hølum, sum náttúrliga eru knýtt at køkinum - t.d. í stovuni.

**Útbjóðarin** skal meta um, hvat slag av mati og hvussu stórar nøgdir køkurin klárar, í hesum sambandi skal hugsast um goymslu av rávørum, tilgerð og borðreiðing av matinum.

**Nøgd og útboð**, avgerandi fyri, hvat heimablídni kann fevna um, er:

- Stødd á køkinum
- Útbúnaðurin í køkinum (køliskáp, kókiumstøður o.s.fr.)
- Innrættingin í køkinum (t.d. borðpláss, møguleiki at uppdeila rávøru og lidna vøru)

[1] Løgtingslóg nr. 46 frá 21. Juni 1985 um matvørur v.m.
[2] Rakstrarreglurnar eru hjálagdar, málnr.: 2008-00294-3.